# Læran av altjóða




## Hetta er seinna greinin av tveimum, har Magni Laksáfoss viðger fíggjar-kreppuna, sum herjar í heiminum

VINNU-KRONIKK



*Magni Laksáfoss*
*búskaparfrøðingur*

Kronikkin greiðir frá árinunum av fíggjarkreppuni á føroyska búskapin og á heimssamfelagið. Føroyar eru rættiliga væl fyri at taka móti kreppuni og fara væntandi at sleppa rættiliga snikkaleyst gjøgnum kreppuna. Haraftur-ímóti fer heimssamfelagið at broytast munandi. Hugleitt verður um hetta er endin av kapitalismuni og av tíðini hjá Ameriku sum lokomotiv fyri heimsbúskapin.

### Minni árin enn í øðrum londum

Avleiðingarnar av fíggjarkrepp-uni verða væntandi minni her heima í Føroyum í mun til í øðrum londum, tí føroyski búskapurin í nógvar mátar er væl fyri.

Fíggjarkreppan er fyrst og fremst ein skuldarkreppa, tvs. ein kreppa fyri tey, sum hava átikið sær stóra skuld. Skuldarbindingin í føroyska samfelagnum er væl minni enn í øðrum londum. Hóast einstakar familjur, kommunur og fyritøkur hava rættiliga stóra skuld, er vanliga mynstrið, at bæði húsarhaldini, vinnulívið, bankarnir og tað almenna hava rættiliga avmarkaða skuld. Tí ger ein kreppa á fíggjarmarknaðinum avmarkaðan skaða í Føroyum, sum støðan er í løtuni.

Hetta merkir ikki at eingin avleiðing verður. Mest sannlíkt er, at avleiðingarnar verða nakað tær somu sum í øðrum londum – bara minni. Har verður roknað við minkandi keypiorku, minkandi byggivirksemi, færri íløgum og øktum arbeiðsloysi. Tað er ilt at siga hvussu ógvuslig og long niðurgongdin verður – spádómarnir eru nógvir – higartil hava flestu rakt illa – flestu hava undirmett avleiðingarnar.

### Ikki orsakað av skilagóðari búskaparstýring

Tað er nærliggjandi at koma til eina niðurstøðu um, at tað er orsakað av skilagóðari búskapar-stýring seinastu árini, at vit sleppa so væl gjøgnum fíggjar-kreppuna. Hetta er tíverri ikki rætt. Veruliga orsøkin er, at skuldin í Føroyum bleiv sanerað í 90'unum og at vit vóru so sein í gongd við øktu lántøkuna, at vit ikki náddu at koma longur í skuldarbindingini. Eingin ivi er um at skeiv kós var sett og høvdu vit sloppið at hildi áfram í nøkur ár afturat høvdu trupuleikarnir verið nógv størri.

Vit hava ikki dugað at lagt til síðis í góðum tíðum. Politiska skipanin er ikki búgvin til at síggja avlop á fíggjarlógini – alt skal brúkast beinanvegin. Tað skal vera mín vón, at vit einaferð læra at reka ein skilagóðan búskaparpolitikk!

Javnan hoyra vit at tað er veiðumentanin í føroyingunum sum ger at "vit fiska tá nakað er at fiska". Møguliga er tað so. Eg skal ikki kunna siga tað. Men vit mugu læra at leggja á annan bógv, tí hetta skilið kann ikki halda fram.

### Politisku tiltøkini

Higartil hava flestu politisku tiltøkini yvirfyri fíggjarkreppuni verið merkt av panikk-loysnum. Vit hava vaknað upp onkran morgunin til at um náttina varð enn ein banki bjargaður av onkrari stjórn, ella at í vikuskiftinum – meðan børsurin var stongdur – hittust stjórnarleiðarar fyri at snikka saman onkra ætlan. Mest struktureraða og gjøgnumhugsaða tiltakið er nokk danska bankaloysnin. Sjálvt hon sá dagsins ljós eftir bert einum vikuskifti - møguliga hava embætismenn í Nationalbankanum tó arbeitt longur við uppskotinum.

Eftir míni meting hevur tað alstóran týdning at fara burtur frá "eldsløkking" og yvir til "tilbúgving". Eg haldi at orðini hjá A. P. Møller um at "intet tab bør ramme os som kunne være undgået med rettidigt omhu" hóska væl til støðuna. Vit eiga at skapa okkum eina tilbúgving – vit eiga at vera til reiðar!

### Skapa eina tilbúgving

Tí eiga vit at seta fimm arbeiðsbólkar niður fyri at viðgera støðuna. Teir skulu skapa eina tilbúgving á ymisku økjunum.

Fyrsti bólkurin eigur at hyggja eftir møguligum trupuleikum av fíggjarkreppuni innan fíggjar-geiran. Sjálvt um vit hava lóggivið ein "bankapakka" kunnu onkrir trupuleikar framvegis vera. Bólkurin skal tí kanna trupuleikar og finna møguligar loysnir til politiska mynduleikan, soleiðis at politiski mynduleikin er greiður yvir støðuna og hvat kann gerast.